Álit

í

løgtingsmáli nr. 91/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkjunum sjóuppmerking og vitaverk)

Aksel V. Johannesen, løgmaður, hevur lagt málið fram 28. mars 2023, og eftir 1. viðgerð 30. mars 2023 er tað beint Uttanlandsnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 13. apríl 2023 og 3. mai 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við løgmann, Aksel V. Johannesen, og landsstýrismannin í uttanríkis- og vinnumálum, Høgna Hoydal.

Yvirtøkan av málsøkinum sjóuppmerking og vitaverk er liður í at styrkja og menna sjóvinnuøkið í Føroyum.

Við yvirtøkuni av sjóuppmerking og vitaverkinum verða lóggávu valdið, útinnandi valdið og fíggjarliga ábyrgdin á hesum økjum yvirtikin sum føroysk sermál.

Sjálvt um Løgtingið samtykkir uppskotið um yvirtøkuna í hesi tingsetuni, so er sjálv yvirtøkan sett til at verða 1. juni 2024. Hetta er fyri at tryggja, at yvirtøkan fer skynsamt fram, og økini verða væl rikin eftir yvirtøkuna.

Yvirtøkan fevnir um 24 vitar, sum verða riknir frá gomlu Loranstøðini á Eiði. Harafturat um onnur sjómerki, starvsfólk, alla rakstrarútgerð, sum er knýtt at vitunum, og DGPS-støðina á Bøllureyni.

Føroyskir myndugleikar yvirtaka eisini ábyrgdina av avtalum og samstarvinum, sum Søfartsstyrelsen hevur við Arktisk Kommando, MRCC og Landsverk.

Løgtingslóg um trygd á sjónum verður eisini broytt í sambandi við yvirtøkuna, soleiðis, at dagførdar reglur um sjóuppmerking verða settar í gildi í Føroyum, og heimildin at skipa økið verður hjá føroyskum myndugleikum.

Økið um bjarging av skipsrovum o.l., ið eru til vanda ella veruligan ampa fyri sigling og fiskiskap, sum í dag er reglubundið við norskari lóg, verður eisini yvirtikið.

Bygningarnir, sum eru tætt knýttir at rakstrinum av vitaverkinum, verða latnir føroyskum myndugleikum ókeypis í sambandi við yvirtøkuna av vitaverkinum. Nevndin vónar, at bygningarnir eftir yvirtøkuna fara at verða brúktir í størri mun, til annað endamál, enn teir verða brúktir til í dag.

Søfartsstyrelsen hevur upplýst, at í 2022 var samlaði kostnaðurin fyri rakstur av vitaverkinum í Føroyum 3,75 milliónir krónur. Hetta er nakað lægri enn mett, tá ið tað áður hevur verið umrøtt at taka yvir sjóuppmerking og vitaverk. Landsverk metir kostnaðin at verða nakað hægri.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið fer í næstum at umrøða kostnaðarmetingina fyri at tryggja, at tað í sambandi við fíggjarlógina fyri 2024 verður sett hóskandi upphædd av til at fyrisita sjóuppmerking og vitaverk á ein fullgóðan hátt.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Uttanlandsnevndin, 4. mai 2023

Bjarni Hammer formaður	Bárður á Steig Nielsen næstformaður	Annika Olsen
Liljan Weihe	Jenis av Rana	Jacob Vestergaard
	Sólvit Nolsø	